UTTAN ÚR HEIMI

# Bin Laden kringsettur



*Hildið verður, at bin Laden hevur einar 1500 mans at verja seg. Hetta eru menn, sum eru bin Laden trúgvir, og talan er helst um nakrar av teimum bestu krígsmonnunum hjá al-Qaeda, verður sagt*
*Mynd: Reuter*

**Staðkendir afghanskir hermenn hava nú kringsett eitt øki, har teir halda, at bin Laden fjalir seg í einari holu**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað eru hermenn av pashtun-fólkinum, sum siga seg hava kringsett Osama bin Laden nærhendis pakistanska markinum. Økið, sum teir hava hersett, nevnist Tora Bora, og servandir amerikanskir og bretskir hermenn eru komnir pashtunsku hermonnunum til hjálpar at finna tann eftirlýsta yvirgangsleiðaran.

Hildið verður, at bin Laden hevur einar 1500 mans at verja seg. Hetta eru menn, sum eru bin Laden trúgvir, og talan er helst um nakrar av teimum bestu krígsmonnunum hjá al-Qaeda, verður sagt.

Ein talsmaður hjá pashtununum segði í dag, at teir ætla at manna eitt lið við umleið 2000 monnum, og at teir fyrstu skuldu fara til Tora Bora í dag.

## Boð frá bin Laden

Trygdarovastin í syðra Afghanistan, Hazrat Ali, sigur, at teir hava hoyrt eini boð frá bin Laden, har hann boðar frá, at hann ætlar sær ikki at stríðast ímóti sínum muslimsku trúarfeløgum, men einans ímóti teimum fremmandu hermonnunum t.v.s. teimum amerikansku og bretsku hermonunum.

Trygdarovastin sigur, at hann tí hevur sent nakrar umboðsmenn at vita, um bin Laden og menn hansara eru sinnaðir at leggja vápnini og at geva seg yvir.

Ein av teimum pashtunsku herleiðarunum sigur, at tað helst verður neyðugt at nýta einar 4000 mans til at basa monnunum hjá bin Laden, og at tað helst fer at taka einar tríggjar dagar at basa fíggindanum.

Hildið verður, at umleið 60 servandir amerikanskir og bretskir hermenn eru á leiðini við Tora Bora.




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2676, P/F Á Hálsi, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 09.10.2001.
Nýtt navn: P/F
09.10.2001.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Elsebeth Andreasen, Tjarnardeild 13, 100 Tórshavn (formaður), Símun Petur Birgir Andreasen, Tjarnardeild 13, 100 Tórshavn og Joen Peter Andreasen, í Lágni 11, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Símun Petur Birgir Andreasen, Tjarnardeild 13, 100 Tórshavn.

Felagið er tann 09.10.2001, farið í likvidatión við Ólavi Jákupi Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Box 6, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 4. desember. 2001.

Kristin Balle




Ísrael:

# Vandi fyri samgongusliti

**Arbeiðaraflokkurin umhugsar at taka seg burtur úr ísraelsku stjórnini**

ÚTLAND
*Fartekst*

Shimon Peres, sum er ísraelskur uttanríkisráðharri og formaður í Arbeiðaraflokkinum, segði í gjár, at flokkurin umhugsar at taka seg burtur úr stjórnarsamgonguni.

- Eg veit, at fleiri limir í flokkinum halda, at vit eiga at taka okkum burtur úr samarbeiðinum, segði Peres á einum tíðindafundi í rumenska høvuðsstaðnum Bucuresti, har hann hevur verið á fundi í Felagsskapinum fyri trygd og samstarvi í Evropa.

Peres legði afturat, at flokkurin fer skjótt at taka støðu til spurningin.



*Tað er eingin loyna, at Shimon Peres og Ariel Sharon, forsætisráðharri eru ósamdir um ísraelsku framferðina ímóti palestinunum*
*Mynd: Reuter*

Tað er eingin loyna, at Shimon Peres og Ariel Sharon, forsætisráðharri eru ósamdir um ísraelsku framferðina ímóti palestinunum. Peres er meiri hugaður fyri einum meiri varnum politikki, og hann hevur alment sagt, at tann harðrendi politikkurin hjá Sharon ger, at harðskapurin heldur fram.






# Svimjihylurin upp á beding

**Svimjihøllin í Havn hevur fyribils afturlatið. Hetta kemst av vanligum viðlíkahaldi, og latið verður uppaftur 2. januar komandi ár**

FRÍTÍÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnudagin 2. desember var seinasti dagur svimjihøllin í Havn hevði opið. Høllin er nú afturlatin restina av árinum av tí at ymiskt arbeiði skal gerast við høllina og annað.

– Vit kalla hetta, at vit taka svimjihylarnar uppá beding, sigur Heri á Lava Olsen stjóri fyri svimjihøllina.

– Vit hava havt ein steðg einaferð um árið nú í fleiri ár. Hesuferð er steðgurin tó eina viku longri enn seinasta ár, og kemst hetta av, at vit skulu tøma kavingarhylin.

Kavingarhylurin hevur ikki verið tømdur í 12 ár. Hetta skal tó ikki uppfatast sum tað, at sama vatnið hevur verið í hylinum í samfull 12 ár. Vatnið verður skift út alla tíðina og hvønn minutt kemur reint vatn inn. Stór filtur eru at reinsa vatnið, og kavingarhylurin er altíð spegilsklárur á at líta.

– Vanliga tøma vit ikki hylarnar uttan nakra orsøk, greiðir Heri frá.

– Vit hava sæð okkurt á botninum, men vónandi er tað ikki nakað stórt, ið skal gerast.

Tann stóri kavingarhylurin, sum er fýra metur djúpur, inniheldur heili 600 tons av vatni. Hetta vatnið skal latast ógvuliga spakuliga úr hylinum av tí, at trýstið á botnin er so stórt. Um ikki verður ansað nóg væl eftir, kunnu skaðar standast av at tøma hylin.

Báðir teir smáu hylarnir eru tømdir, meðan 25-metrahylurin enn er fullur av vatni. Hann skal heldur ikki tømast, tí hann varð tømdur fyri trimum árum síðani.

Tað er ikki beinleiðis nógv arbeiði at gera. Onkrar flísar eru brotnaðar her og har, og so skal tað eisini gerast reint uppi í høllini.

## Durðurin skiftast

Eisini skal gamli durðurin í svimjihøllini skifast. Høvuðsdyrnar verða skiftar út við nýggjar skjótihurðar við "følarum", soleiðis at tað verður meira handikappvinarligt at sleppa inn.

Sjálvt um sjálvir svimjihylarnir eru afturlatnir, hava sólirnar í høllini framvegis opið. Starvsfólkainngongdin verður nýtt til hetta høvið, og hava tær opið frá 9 – 15, og hava sólirnar opið til 20. desember.

Havnar Svimjifelag, sum venur í svimjihøllini, sleppur at halda áfram at venja í 25-metra hylinum hesa vikuna og eitt sindur inn í næstu viku. Sìðani verða tey noydd at bíða til hylurin letur uppaftur fyrst í komandi ári.

– Tað er okkum ikki rættiliga greitt enn, um tað nakrar ábøtur skulu gerast á kavingarhylin. Men um so er, verður tað gjørt, og sjálv svimjihøllin letur uppaftur 2. januar. Við ella uttan kavingahyli, sigur Heri á Lava Olsen at enda.



*Svimjihøllin í Havn er fyribils stongd, men letur hon uppaftur fyrst í komandi ári*
*Savnsmynd*

